# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og, turt og sólglottar, men eisini mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, turt pg sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 18 stig, heitast vestanfyri




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og fyrrapartin turt og sólglottar, men út á seinnapartin møguliga sirm. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og regn av og á. Mánakvøldið og týsdagin upp í ein strúk av vestri og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Ongar ætlanir um nýggjan flogvøll á Glyvursnesi

*Vinnumálastýrið hevur samráðst við danskar myndugleikar um møguliga yvirtøku av rakstrinum av flogvøllinum í Vágum og ymiskar betringar av vøllinum í hesum sambandi, sigur Finnbogi Arge m.a. í svari til Heðin Mortensen*



ÓLAVUR Í BEITI

Við jøvnum millumbili kemur fram spurningur um flogvøll á Glyvursnesi, men enn hevur landsstýrið ongar ítøkiligar ætlanir um nakran flogvøll á Glyrsnesi, ið hvussu so er ikki hetta landsstýrið. Til beinleiðis spurningin, um landsstýrið hevur nakrar ætlanir um flogvøll á Glyvursnesi, sigur Finnbogi Arge, at um hetta eru ongar ítøkiligar ætlanir.

Um ongar ætlanir eru, so ynskist svarað, hvør ætlan so er fyri framtíðar flúgving til og úr Føroyum? vil Heðin Mortensen so hava at vita, og Finnbogi Arge svarar, at Vinnumálastýrið hevur samráðst við danskar myndugleikar um møguliga yvirtøku av rakstrinum av flogvøllinum í Vágum og ymiskar betringar av vøllinum í hesum sambandi.

– Ætlanin er at leingja vøllin 200 m, so at hann verður 1450 m, og at fáa til vega glíðirás (Glide Path), umframt aðrar betringar. Ein longri vøllur merkir øktan kapasitet, tí flogfør kunnu lastast tyngri enn nú, røkka meira fjarstøddum ferðamálum, møguleiki verður at nýta onnur flogfør, o. a. Glíðirás, sum er ein elektronisk navigatiónsskipan, bøtir um reglusemi, tí møguleiki verður fyri at lenda í verri sýni enn nú.

– Atlantsflog roknar við einum ávísum ferðslulopi um flogvøllin í Vágum, tá fasta sambandið um Vestmannasund er veruleiki, sigur Finnbogi Arge.

**Einki sett av**
Viðvíkjandi spurninginum, hvørja støðu landstýrið hevur til, at t.d. Tórshavnar býráð fer undir at fyrireika og byggja flogvøll á Glyvursnesi, svarar Finnbogi Arge, at Tórshavnar Býráð kann í prinsippinum fara undir at byggja og reka floghavn á Glyvursnesi, um donsku loftferðslumyndugleikarnir góðkenna verkætlanina og loyva rakstrinum, og um býráðið heldur seg innanfyri íløgukarm landsstýrisins. Málið eigur helst at verða viðgjørt av kommunala eftirlitinum.

– Peningur er ikki settur av til flogvallaendamál í 10-ára íløguætlan landsstýrisins, sum verður løgd fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

**Avmarkaðir ágóðar**
Og hvussu langt landsstýrið er komið við fyrireikingunum at skipa flúgving ímillum Tvøroyri og miðstaðarøkið, sigur Finnbogi Arge, at Atlantsflog røkir sum er innanoyggja flogferðslu við tyrlu millum Havnina og Suðuroynna tvær ferðir um vikuna, men undirtøkan er lítil.

– Málið um flogleið millum Havnina og Suðuroynna er viðgjørt í Samferðsluætlanini hjá Vinnumálastýrinum frá 1999, og niðurstøðan var tá, at flogleiðin bert gevur avmarkaðar ágóðar, m.a. tí at talið á ferðafólki, ið væntandi fóru at nýta nýggju flogleiðina, er avmarkað, og at ætlanin ikki fór at loysa seg samfelagsbúskaparliga.

Og at enda sigur Finnbogi Arge, at Vinnumálastýrið á fundi við Tvøroyrar- og Tórshavnar Býráð í september 1999, hevur móttikið uppskot um flogvallir í báðum kommunum, sum ætlandi kunnu nýtast til innanlands flúgving. Tvøroyrar Býráð vísir á tvinnar møguleikar í Froðba, har annar vøllurin ætlandi verður 600 m og hin 900 m langur. Tórshavnar Býráð vísir á verkætlan á Glyvursnesi við 800 m longum og 150 m breiðum vølli, sum kann leingjast til 1800 m.



Hátrýstið yvir Føroyum fer spakuliga eystureftir.



Hátrýstið eystanfyri Føroyar fer í landsynning og viknar nakað.



**Hitalagið mált frá 10./05. kl 06⁰⁰–11./05. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,5°C**
Minsti hiti máldur í mai: **÷3,0°** Mesti hiti máldur í mai: **19,7°**



Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 10./05. kl 6⁰⁰–11./05. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í mai: 1,4 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 16 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannahavn | 21 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | – |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 12 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

TMI Føroyar

Skeið
16. og 18. mai
2000

Tilmelding á tel 31 09 01

## Vestfalskyrrindi

6. mai: Mánin næstur jørðini
10. mai: Fyrra kvarter
18. mai: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. mai | 2.06 | 14.47 | 1.06 | 13.47 | 1.21 | 14.02 | 4.06 | 16.47 | 5.06 | 17.47 | 0.21 | 13.02 | — | 12.02 | 2.21 | 15.02 | 3.21 | 16.02 | 1.51 | 14.32 | 3.06 | 15.47 |
| 13. mai | 3.29 | 16.03 | 2.29 | 15.03 | 2.44 | 15.18 | 5.29 | 18.03 | 6.29 | 19.03 | 1.44 | 14.18 | 0.44 | 13.18 | 3.44 | 16.18 | 4.44 | 17.18 | 3.14 | 15.48 | 4.29 | 17.03 |
| 14. mai | 4.32 | 16.57 | 3.32 | 15.57 | 3.47 | 16.12 | 6.32 | 18.57 | 7.32 | 19.57 | 2.47 | 15.12 | 1.47 | 14.12 | 4.47 | 17.12 | 5.47 | 18.12 | 4.17 | 16.42 | 5.32 | 17.57 |
| 15. mai | 5.22 | 17.44 | 4.22 | 16.44 | 4.37 | 16.59 | 7.22 | 19.44 | 8.22 | 20.44 | 3.37 | 15.59 | 2.37 | 14.59 | 5.37 | 17.59 | 6.37 | 18.59 | 5.07 | 17.29 | 6.22 | 18.44 |

Kelda: Skipalistin 2000